Vietnam - landi› vi› teim stóru mótsetningunum

B‡rlív í Vietnam

Fer›arfrásøgn og huglei›ingar frá túrinum hjá 2q í Hoydølum til Vietnams í døgunum 29.2. - 16.3.2000

Fari› var› úr Vágum vi› Atlantic Airways t‡sdagin 29. februar.Ta› var hvassur vindur av útnyr›ingi og kalt.

Í fer›alagnum vóru 21 fólk - 19 næmingar og 2 lærarar, sum hálvtanna› ár frammanundan høvdu gjørt av at fara námsfer› til fjarskotna landi› Vietnam í Su›ureysturasia. Hetta landi›, sum vit einamest kenna í sambandi vi› bló›uga kríggi›, sum fór fram har og var li›ugt fyri júst 25 árum sí›ani.

Eftir at avger›in um fer›amáli› var› tikin, var› øll orka løgd í at fáa ney›uga peningin til vega og nú var komi› á mál. Uttanfyri bí›a›i flogfari› hjá Atlantic.

Fer›in yvir til Saigon

Túrurin eystur til Vietnams fór umvegis Keypmannahavn og Singapore til Saigon ella Ho Chi Minh city, sum b‡urin eitur í dag og vardi gó›ar 15 tímar. Á flogvøllinum í Saigon fingu vit eina fyrstu hóming av landinum og politisku st‡risskipanini. Á›renn vit sluppu út úr floghavnsbygninginum, skuldu vit gjøgnum langar bí›irø›ir, har álvarsamir tollarar, pass- og immigratiónsmyndugleikar kanna›u fólk og skjøl bæ›i væl og vir›iliga og t‡›iliga sást ta› á næmingunum, at teir kendu seg illa. Tó skal sigast, at eftir hetta merktu vit líti› til, at hetta var eitt land vi› kommunsitiskari einaræ›isskipan. Hóast politistar og hermenn vóru at síggja á hvørjum horni, vóru vit ongantí› ste›ga› ella kanna› á túrinum og vit høvdu frítt at fara allasta›ni.

Uttanfyri var hitin um tey 36 stigini og vætan í luftini nærka›ist 90. Men lukkutí› bussurin, i› koyrdi okkum inn til hotelli› í mi›b‡num, hev›i air condition. Tann hálva tíman, túrurin vardi, sótu vit mest og øta›ust yvir fer›sluna, tí úr øllum ættum tustu bilar, prutl og súkklur. Í Saigon eru uml. 2 mill. prutl, t.e. uml.1 prutl til 3. hvønn íbúgva›. Her var rættuligt fer›slurok ella skipa› kaos, og hvussu tey bóru seg at at koma heilskapa› fram, var okkum ein gáta. Tá tú fór yvir um vegin, var avgerandi ney›ugt, at tú gekst vi› somu fer›allatí›ina, annars kundi tú vænta at ver›a ni›urkoyrdur í hurlivasanum. Men ta› doyggja eisini 6 fólk í me›al í fer›sluni í Saigon hvønn dag.

Eisini hildu vit ta› vera sera løgi›, at flest allar genturnar í fer›sluni, sum vóru klæddar í lokalu Ao Dai klæ›ini, sum er langur kjóli vi› buksum undir, vóru í longum handskum og høvdu turriklæ›i fyri andliti›. Orsøkina hildu vit ver›a dusti›, sum tey vildu sleppa undan at anda í seg, men seinni fingu vit at vita, at grundin var ein heilt onnur. Tey vardu seg ímóti sólargeislingunum, tí tey vildu vera so hvít sum gjørligt !!



Vanskapt barn – avlei›ing av krígnum

Landi› og fólki›

Landi› Vietnam hevur navn eftir “Viet”, i› merkir fólk, og “Nam”, i› merkir fólki› í su›uri, ella har fólki› b‡r. Vietnam er í vídd 330.340 km2, og strekkir seg sum eitt S teir uml. 1650 km úr su›ur og nor›.

Ve›urlagi› er tropiskt monsunklima vi› regntí› frá septembur til januar, men vi› stórum muni á ve›rinum í teimum ymisku økjunum í landinum.

Íbúgvaratali› er uml. 82 mill., og av hesum búgva 78% úti um landi›, me›an hini 22% búgva í b‡unum. Mi›alaldurin er einans 20 ár, og aldursb‡ti› er orsaka› av krígnum sera skeivt, tí 39% av fólkinum eru undir 15 ár.

Høvu›ssta›urin er Hanoi nor›anvert í landinum vi› 3,2 mill. íbúgvum, men tann størsti b‡urin er Ho Chi Minh city í sy›ra partinum vi› knappliga 6 mill. íbúgvum.

Mi›alársløninin fyri hvønn íbúgva er uml. 1300 kr, og sambært Heimsbankanum liva 51% av fólkinum í Vietnam undir fátækramarkinum, sum er mett eftir, um fólk liva fyri minni enn 1$ um dagin.

Mi›allivialdur var› í 1990 mettur til 62,7 ár. Vinnub‡ti› er merkt av, at Vietnam er eitt landbúna›arland. Í landbúna›inum starvast 70% av fólkinum, me›an 8% starvast innan ídna›/handil og 22% í tænastuvinnunum.

Nevndu tøl og uppl‡singar stava frá Heimsbankanum, Danska uttanríkismálará›num, ST og Hagstovu Vietnams.

Fyri at avmarka› fólkavøksturin í landinum hevur stjórnin heitt á hjún um ikki at fáa sær meira enn 1 ella í mesta lagi 2 børn. Um hesi bo› ikki ver›a fylgd, og familjan fær fleiri enn 2 børn, ver›a tey sekta› á ymiskan hátt, t.d. missa tey alment settu møguleikan at koma sær fram í sínum arbei›i. Hetta ver›ur ta› vanliga ikki tosa› opi› um, men ta› er sambært okkara heimildarfólki, “vanlig mannagongd”.

Í Vietnam liva 54 ymiskir minnilutabólkar ella fólkasløg, og tann størsti av hesum er Viet - fólki›. Tó eru ongir trupulleikar millum fólkabólkarnar, og liva hesir í sátt og semju.

Máli› er vietnamesiskt ella “Kinh”.

Høvu›sreligión- og tjó›arreligión í Vietnam er buddisma. A›rar t‡dningarmiklar religiónir eru katolicisma, hinduisma, cham, taoisma, islam og náttúrureligiónir.

Skúlaskipanin er ø›rvísi enn okkara á mangan hátt, men einamest tí stórt trot er á lærarum, og børnini ganga tí í skúla í 2 skiftisholdum, nøkur fyrrapart og onnur seinnapart.

Skúlaskipanin er annars henda:

Nursery school :
2 - 5 ár
Primary school:
6 - 11 ár (5 ár)
Secondary high school:
11 - 15 ár (4 ár)
High school:
15 - 18 ár (3 ár)
University:
5 ár í alt

Barnaskúlin er ókeypis, men tá børnini gerast eldri uml. tey 15 árini, skulu tey gjalda skúlapengar. Mangan hittu vit foreldraleys børn, i› seldu postkort o.t., sum skuldu n‡tast til skúlagjaldi›.

Samanumtiki› hevur stjórnin í Vietnam lagt dent á, at øll skulu hava útbúgving, men eftir at Doi moi (“opin hur›”) búskaparskipanin var› sett í verk í 1986, hava nógv foreldur serliga á bygd tiki› børnini úr skúlanum, fyri at tey kunnu arbei›a í familjufyritøkum, og avlei›ingin gerst økt analfabetisma. Annars metir ST stovnurin, at 94% av tilkomna fólkinum dugir at lesa.

Politiska skipanin

Vietnam er kommunistiskt land, har politiska valdi› er savna› í hondunum á kommunistaflokkinum, og hóast onnur lond eru farin frá kommunistisku skipanini, hevur lei›slan í Vietnam ikki slaka› vi› politiskum ábótum, eins og ta› er gjørt á búskaparliga økinum.

Politiska skipanan er bygd á sovjettiskan leist og samstarva› var› beinlei›is vi› st‡ri› í Kreml, men eftir at Gorbatjov kom til valdi› í 1985 og royndi at fáa betri samstarv vi› vesturheimin, og eftir at Sovjetsamveldi› datt sundur í



Fátakradømi

1991, hev›i Vietnam ongan gó›an. Um sama lagna, sum rakti eysturevropeisku londini, ikki skuldi raka vietnamesiska st‡ri›, var› ney›ugt at bøta um livikor›ini í landinum, og hetta kundi einans gerast vi› samstarvi úteftir. Ta› var ikki lætt, tí Vietnam var at kalla avbyrgt frá londunum í Asia og Vesturheiminum. Men fari› var undir arbei›i› vi› treysti, og krúnan á verkinum var, tá amerikanska handilsbanni› var› tiki› burtur í 1995 og diplomatiska sambandi› uppafturtiki›. Hetta gav samstundis landinum atgongd til menniningarhjálp, eitt nú kapital úr Heimsbankanum og Valutagrunninum.

Eftir at Vietnamkríggi› var av í 1975, reinsa›i lei›slan í Hanoi allar lei›ararnar í Su›urvietnam út og setti bert Hanoi trúgv vi›haldsfólk í a›alst‡ri› ella stjórnina. Alt vald savna›ist sostatt í hondunum á monnunum úr Nor›urvietnam, og allar avger›ir skulu umvegis Hanoi stjórnina. Hetta ger sjálvandi politisku avger›argongdina trupla og stirvna. Men hóast stjórnin hevur lati› upp fyri ábótum á búskaparliga økinum, tvíheldur hon um ta politisku skipanina.

Ein av fer›arlei›arunum helt fyri, at stjórnin ikki kundi loyva stórvegis politiskar broytingar, sum t.d. fleirflokkaskipan, tí hetta bert hev›i ført til kaos eins og í eysturevropeisku londunum, tá múrurin fall. Skilabetri helt hann ta› vera, um stjórnin, sum frá lei›, fór at loyva smávegis broytingum á politiska økinum, eins og ta› var gjørt á búskaparliga økinum.

At hetta var eitt kommunistiskt land fingu vit at sanna, tá vit skuldu vitja ein studentaskúla í Saigon.

Vit høvdu gjørt avtalu heimanífrá um vitjanina, fyri at okkara næmingar skuldu læra teirra skúla at kenna og øvugt, men tá vit koma yvir hagar og spurdu um avtaluna, fingu vit eina frágrei›ing fyri og a›ra eftir, men ni›urstø›an var altí› tann sama, at onki› var greitt enn. Vit royndu at fáa svar líka til seinasta dagin, men onki hendi. Naka› “sint” spurdu vit tí, um vit ikki kundu fáa eitt ærligt svar, um hvør trupulleikin var, og tá fingu vit at vita, at ein slík vitjan skuldi gó›kennast á hægsta politiska stø›i, og hetta tók tí›.

Veruliga orsøkin til, at henda vitjan ikki fekst í lag, var óttin fyri vesturlendskari propaganda.

Føroyska fer›alagi›

Búskaparliga skipanin

Vietnam hevur lært av, at kommunistisku skipanin í Eysturevropa fall, og hevur lati› upp fyri búskaparligum broytingum.

Gjaldoyra› eitur “dong”- og 1$ er í løtuni uml.14.000 dong ella 8 kr.

Tann búskaparligi endurskó›anarpolitikkurin nevndur “Doi moi” byrja›i í 1986 - og er eitt stig burtur frá kollektivu búskaparskipanini. Jør›in ver›ur latin privatum at dyrka, sjálvstø›ug vinnurekandi byrja egi› virki› og serliga ver›ur roynt at fáa joint venture ella samstarvsavtalur vi› útlendskar fyritøkur fyri at fáa útlendskan kapital og know how til landi›. Vanliga eru hesar joint venture avtalur solei›is samansettar, at vietnamesiski parturin er 40% og útlendski parturin 60%. Tann vietnamesiski parturin er aloftast arbei›smegi, me›an tann útlenski parturin er kapitalur.

N‡skipanin hevur gingist væl, og ein menning er at hóma á flestu økjum, og hetta sæst aftur í árliga búskaparvøksturinum, sum er øktur úr 8% í 1989 til 9,5% í 1995. Bruttotjó›arúrtøkan (BTÚ) var í 1995 gó›ar 20 mia. $.

Útfluttu vørurnar eru olja, fiskur o.a. marinuvørur, rís, kaffi og cashewnøtur vi› einum samla›um vir›i uppá 5,19 mia. $ í 1995 tølum.Vietnam er sjálvfors‡nandi vi› rísi, og ver›ur vi› sínum útflutningi á 3 mill. tons mett sum kornkamari› í Su›ureysturasia.

Innflutningurin, i› hevur eitt vir›i uppá 7,9 mia. $, er samansettur av kemiskum tø›um, maskinum og útbúna›i til tubbaksídna›in. Sum ta› sæst av vørusamansetingini, ver›ur roynt at innflyta útbúna›, i› kann menna landi›. Trupulleikin er bert, at landi› er fátækt og skyldar 25 mia. $ til útheimin, og ta› tí ikki hevur rá› at fáa hendur á tí útbúna›i, tørvur er á, men vi› sínum stóru og fjølbroyttu ressursum og vi› stóra útlendska íløguhuginum átti ein búskaparlig menning at veri› gjørlig í framtí›ini.

Sæ› vi› okkara eygum er príslegan sera lág. T.d. kostar ein døgur›i á matstovu ml. 80. - 100.000 dong t.e. 40 til 50 kr. Flestu vørur eru sera bíligar her, og serliga bílig eru tey skraddaraseyma›u klæ›ini. Annars eru tær kendu “lakk vørurnar” eisini vælumtóktar og sera bíligar.

Saigon

Í Saigon eru í dag uml. 6 mill íbúgvar, og er hetta ein trífalding av íbúgvaratalinum sí›an 1975, tá Vietnamkríggi› enda›i. Orsøkin til fólkaflytingina er lutvíst, at stórir partar av landbúna›arjør›ini vóru lagdir í oy›i av krígsávum og lutvíst, at ta› unga fólki› ikki vildi liva á hungursmarkinum úti á landinum, men søkti sær eydnuna í teimum størru b‡unum eitt nú Saigon. Hetta gav b‡armyndugleikunum so stórar trupulleikar, at eitt ávíst tí›arskei› var› bann sett fyri at flyta til b‡irnar uttan loyvi frá myndugleikunum. Saigon er stórb‡ur í or›sins rætta t‡dningi. Her var alt, sum hugsast kundi: Larmur, fer›sla, fólk, markna›ir, undirhald, men eisini dálking og fátækradømi. Serliga leg›i ein væl til merkis biddararnar og fátæku fólkini. Vanligastu or›ini “You buy from me, sir” ella “wonna dallar” (1 $) vóru at hoyra allasta›ni. Ein partur av hesum illa støddu fólkum vóru avlamin sum er ein avlei›ing av Vietnamkrígnum. Hvar tú komst, sást tú ta ræ›uligu lagnuna, i› hópur av fólki í Vietnam í dag livir undir, fólk vi› ongum ørmum, ongum beinum, ella sum vóru so vanskapt í t.d. andlitinum, at tú mátti hyggja burtur.

Hesi ólukkud‡rini fáa bert eitt eiti av hjálp frá tí almenna og at síggja ræ›uleikarnar og umstø›urnar, i› hesi fólk livdu undir, nerva›i okkum øll. Samstundis lærdi ta› okkum, hvussu smáir trupulleikarnir í okkara egna landi eru, um samanbori› ver›ur vi› Vietnam.

Anna›, sum ger stø›una uppaftur truplari, er metstóra arbei›sloysi uml. 25 - 35%.

Á strondini

Vietnamkriggi› og Cholon

Fyrsti túrurin gekk til navnframu Cu Chi tunnlarnar 35 km í ein útnyr›ing úr Saigon. Tunnlarnir vóru grivnir í hesum øki, tí her enda›i Ho Chi Minh vegurin - sum útvega›i kommunistum og FNL í Su›urvietnam útger› úr Nor›urvietnam. FNL, i› merkir tann Su›urvietnamesiska Frælsisrørslan, var› sett á stovn í 1960 av fólkum, i› stríddust fyri at fáa Diem st‡ri› frá og at fáa eitt frælst Su›urvietnam. Men longu í 1962 høvdu kommunistarnir fingi› fótin fastin í lei›sluni og rørslan gjørdist skjótt kommunistisk, st‡rd úr Nor›urvietnam. Ho Chi Minh vegurin, i› hev›i sín uppruna í Nor›urvietnam, fór su›ur gjøgnum grannalondini Laos og Cambodja og snara›i inn í Su›urvietnam, júst har sum tunnlaskipanin mentist.

Í Cu Chi royndu næmingarnir tunnlarnar, sum í dag eru ví›ka›ir uml. 4 fer›ir upprunaligu støddina. Ta› finnast uml. 200 km av tunnlum í Cu Chi. Fyrstu tunnlarnir stava frá tí›ini, tá Viet Minh frælsisrørslan bardist móti tí franska koloniveldinum. Sí›ani vóru heilir b‡ir gjørdir undir jør› undir Vietnamkrígnum í stø›um beint undir amerikonskum herna›arlegum.

Næmingarnir royndu tunnlarnar, men nøkur góvu upp og máttu upp úr aftur tunnlunum skjótari enn onnur. Eisini sóu vit ræ›uligu fellurnar, sum vietcong bygdi inni í tunnlunum fyri at for›a teimum sonevndu “amerikonsku tunnlarottunum” at koma sær inn í tunnlaskipanina. Ambo›ini vóru primitiv, men ræ›ulig - oftast bambusspjót og spíkar. Sjálvti fór gjøgnum okkum, tá hugsa› ver›ur um, at menniskju vór›u útsett fyri hesar ræ›uleikar.

Seinni vitja›u vit ta fyrrverandi forsetaborgina, Reunification Hall, sum einamest er kend fyri myndina av vietnamesiska tanksinum, sum breyt seg inn gjøgnum portri› tann 30. apríl 1975, tá Saigon fall. Alt var var›veitt í upprunalíki› bæ›i bústa›ur forsetans og kommunikationscentri› í kjallaranum. Eisini stó› gamli Mercedesbilurin hjá forsetanum órørdur í kjallaranum.

Vitjanin á savninum fyri krígsbrotsverk - War crime Museum - hev›i tó ta størstu ávirkanina á okkum øll. Her sóust sorgarleikir og ræ›umyndir eins og lutir frá krígnum. Serliga tær nógvu myndirnar vóru so sterkar, at nakrir av okkara næmingum fóru grátandi hagani.

Eins og í flest øllum stórb‡um í Asia hevur Saigon sín kinesiska b‡arpart, nevndur Cholon, og hann er samstundis tann største kinesiska enklavan uttanfyri Kina. Cholon ‡ddi av lívi, handli, handverki og gøtubú›um. Sjáldan dugdu hesi enskt, so bl‡antur og fingramál vóru ambo›ini í einum og hvørjum handli. Vørurnar eru ikki prísfastar, og ta› er ein partur av mentanini, at tingast skal um hvørja knappanál.

seinni partur í næsta bla›